# Føroya Kærustovnur
# Avgerð um vinnumál

| Mál nr. :<br>25/26955 | Lóg:<br>Kappingarlógin | Avgerð tikin:<br>30. oktober 2025 |
|---|---|---|

**Ikki kærurætt**


**Samandráttur:**
**Málið snýr seg um, at kærarin hevur kært avgerð hjá Kappingareftirlitinum um at niðurleggja eftirlitsmál. Kappingareftirlitið hevði kannað, um brot varð framt á kappingarlógini, tá A lat inn boð í sambandi við útbjóðing hjá C. Kappingareftirlitið tók avgerð um at niðurleggja eftirlitsmálið, tá útrokningarnar hjá Kappingareftirlitinum staðfestu, at boðið frá A gav fulna fyri kostna og vinning, og at talan tí ikki var um brot á § 11, stk. 1 í kappingarlógini.**

**Føroya Kærustovnur hevur avgjørt at avvísa kæruna.**
**Kærustovnurin metir ikki, at kærarin hevur individuellan og týðandi áhuga í málinum, og kærarin er tí ikki fevndur av skarðanum, ið hevur kærurætt eftir § 32, stk. 2, nr. 2, 1. pkt, í kappingarlógini.**


*Viðmerkingar partanna og upplýsingar í málinum verða ikki endurgivin í fullum líki.*

## Lógargrundarlagið

Løgtingslóg nr. 72 frá 22. mai 2023 um kapping, sum broytt við løgtingslóg nr. 18 frá 26. mars 2024 (*kappingarlógin*)

## Avgerðin hjá Føroya Kærustovni

Føroya Kærustovnur skal innleiðandi gera vart við, at partshugtakið verður í kappingarmálum tulkað sera trongt. Hetta er í rættarvenjuni m.a. grundað við, at uppgávurnar hjá kappingarmyndugleikanum ofta snúgva seg um trúnaðarlig viðurskifti, handilsviðurskifti o.líkn., og at fyritøkur skulu kunna senda trúnaðarlig skjøl, uttan at hesi verða deild út í marknaðinum ella í almenninginum, sí m.a. avgerð hjá Konkurrenceankenævnet frá 4. mars 2016, málsnr. KL-7-2015.

Av hesi orsøk er tað sum útgangsstøði einans beinleiðis móttakarin av avgerðini (adressaturin), ið verður fevndur av partshugtakinum. Í hendinga førum kunnu onnur enn móttakarin av avgerðini tó verða mett sum partur í málinum, um viðkomandi hevur ein týðandi individuellan áhuga í málinum.

Ásett er í § 32, stk. 1 í kappingarlógini, at avgerðir, tiknar av Kappingareftirlitinum eftir § 2, stk. 1, § 3, 1. pkt., § 4, § 6, stk. 1 og 4, 1. pkt., § 7, stk. 1-4, § 8, stk. 2, stk. 4, 2. pkt. og stk. 5 og 6, § 9, stk. 1, 1. pkt., § 10, stk. 2, § 11, stk. 1 og 2, stk. 4, 1. pkt. og stk. 5, § 12, stk. 1 og stk. 6, 1. pkt., § 15, stk. 1-3, § 16, stk. 1, § 17, stk. 4, § 18, stk. 5, § 19, stk. 1-5, § 22, stk. 4, § 26 og § 27, stk. 2 og 3 kunnu kærast til Føroya Kærustovn.

Kappingareftirlitið hevur upplýst, at Kappingareftirlitið hevur tikið avgerð um, at A ikki hevur framt brot á § 11, stk. 1 í kappingarlógini, tá A bjóðaði uppá útboðið hjá C.

# Føroya Kærustovnur
# Avgerð um vinnumál

Kappingareftirlitið hevur upplýst, at avgerðin at niðurleggja málið skal skiljast á tann hátt, at Kappingareftirlitið hevur staðfest, at A ikki hevur nýtt ránsprís í stríð við § 11, stk. 1 í kappingarlógini.

Vísandi til omanfyri standandi staðfestur Føroya Kærustovnur, at talan er um eina avgerð, ið kann kærast til Føroya Kærustovn sambært § 32, stk. 1 í kappingarlógini.

Sambært § 32, stk. 2 í kappingarlógini, kann kæra bert verða latin inn av:

1) tí, sum avgerðin viðvíkur, ella
2) tí, sum annars hevur individuellan og týðandi áhuga í málinum. Hetta er tó ikki galdandi fyri avgerðir hjá Kappingareftirlitinum sambært § 15, stk. 1-3, § 16, stk. 1, § 17, stk. 4, § 18, stk. 5, § 19, stk. 1 og § 27, stk. 2-3.

Sambært serligu viðmerkingunum til § 32, stk. 2, sí LM 98/2022, framgongur, at: "*Tann, sum ein avgerð viðvíkur, er beinleiðis móttakarin av avgerðini (adressaturin). Tann sum annars hevur individuellan og týðandi áhuga í einum máli er tann, sum ein avgerð ikki beinleiðis er rættað ímóti, men har viðkomandi hevur ein individuellan og týðandi áhuga í málinum. Stk. 2, nr. 2, setir tó ávísar avmarkingar fyri møguleikanum hjá tí, sum ikki er beinleiðis móttakari av einari avgerð eftir stk. 1, at kæra.*"

Móttakarin av avgerðini hjá Kappingareftirlitinum er A. Føroya Kærustovnur staðfestir tí, at kærarin ikki hevur kærurætt eftir § 32, stk. 2, nr. 1 í kappingarlógini.

Spurningurin er tí, um kærarin kann sigast at hava individuellan og týðandi áhuga í málinum og harvið vera fevnt av skarðanum, sum hevur kærurætt eftir § 32, stk. 2, nr. 2, 1. pkt. í kappingarlógini.

Avgerðin hjá Kappingareftirlitinum snýr seg um, at A ikki hevur nýtt ránsprís í stríð við § 11, stk. 1 í kappingarlógini, tá A bjóðaði uppá útboðið hjá C.

...

Føroya Kærustovnur vísir á, at sambært § 32, stk. 2, nr. 2, 1. pkt. í kappingarlógini er tað avgerandi, at tann, ið kærur, hevur individuellan og týðandi áhuga í málinum. Talan er um kumulativar treytir, sum báðar skulu verða loknar, fyri at viðkomandi verður mettur at hava kærurætt eftir ásetingini.

Sum málið er upplýst, var tað møguligt hjá øllum áhugaðum at bjóða uppá útboðið hjá C, um viðkomandi leyk treytirnar í útboðnum ... .

Tað er upplýst, at tað vóru tríggjar fyritøkur, ið lótu boð inn í sambandi við útbjóðingina. A vann útboðið við lægsta boðnum, meðan kærarin hevði næstlægsta boðið og B hevði triðlægsta boðið.

Tá øll, ið luku treytirnar í útboðnum ... , kundu lata inn boð, og tá tað vóru tríggjar fyritøkur, ið lótu boð inn, og tá tað harvið er ein onnur fyritøka, ið eins og kærarin lat boð inn og ikki vann útboðið, metir Føroya Kærustovnur ikki, at kærarin kann sigast at hava ein individuellan og týðandi áhuga í málinum, ið skilur seg frá áhuganum hjá øðrum fyritøkum, harundir serliga B, sum heldur ikki vann útboðið. Føroya Kærustovnur metir ikki, at tað, at B ikki uppfylti tilboðstreytirnar hjá C, broytir hetta.. Føroya Kærustovnur skal í hesum sambandi vísa á, at B m.a. hevur upplýst, at B fór at uppfylla treytirnar, um B vann útboðið. Føroya Kærustovnur

metir tí ikki, at áhugin hjá kæraranum í málinum kann sigast at skilja seg frá áhuganum hjá B, bert tí B ikki uppfylti tilboðstreytirnar.

Føroya Kærustovnur skal viðmerkja, at avgerðin hjá Kappingareftirlitinum snýr seg ikki um, hvat av teimum trimum feløgunum átti at hava vunnið útboðið hjá C, men hon snýr seg um, hvørt A hevur framt brot á kappingarlógini. Av hesi orsøk er málsviðgerðin og avgerðin hjá Kappingareftirlitinum einans vend móti A.

Vísandi til omanfyri standandi metir Føroya Kærustovnur, at kærarin heldur ikki hevur kærurætt eftir § 32, stk. 2, nr. 2, 1. pkt. í kappingarlógini.

Samanumtikið metir Føroya Kærustovnur sostatt, at kærarin hevur ikki kærurætt eftir § 32, stk. 2, nr. 1 ella eftir § 32, stk. 2, nr. 2, 1. pkt. í kappingarlógini, og kann tí ikki kæra avgerðina hjá Kappingareftirlitinum til Føroya Kærustovn.

Føroya Kærustovnur skal viðmerkja, at tann umstøðan, at Kappingareftirlitið hevur sent útkast til avgerð í hoyring hjá kæraranum, og at kæruvegleiðing varð givin í útkastinum til avgerðina, broytir ikki metingina hjá Føroya Kærustovni um, at kærarin ikki hevur kærurætt eftir § 32, stk. 2, nr. 1 og 2 í kappingarlógini.

Kappingareftirlitið hevur upplýst, at tað er siðvenja hjá Kappingareftirlitinum at hoyra breitt og at hoyra viðkomandi fyritøkur, sum Kappingareftirlitið hevur savnað inn upplýsingar frá, tá uppskot til avgerð fyriliggur, og at hetta verður gjørt fyri at tryggja, at tað faktiska grundarlagið verður lýst til fulnar og sostatt tryggja rættleikan í avgerðini hjá Kappingareftirlitinum og Kappingarráðnum. Kappingareftirlitið hevur víst á, at kærarin varð við hoyringini biðið um at hyggja eftir teimum upplýsingunum, sum Kappingareftirlitið metti vera handilsloyndir, og fekk somuleiðis høvi at koma við viðmerkingum til uppskotið til avgerð annars.

Føroya Kærustovnur viðmerkir í hesum sambandi, at tað kunnu vera støður, har tað er viðkomandi at biðja um viðmerkingar frá fyritøkum, sum ikki eru partur í málinum. Hetta kann serliga vera viðkomandi, um ein ávís fyritøka hevur hjálpt til við at upplýsa málið. Á henda hátt kann kappingarmyndugleikin fáa váttað, at upplýsingarnir, sum liggja til grund fyri avgerðini, eru rættir, sí m.a. s. 1213-1214 í *Konkurrenceloven med kommentarer, 5. udgave.*

**Vísandi til omanfyri standandi hevur Føroya Kærustovnur avgjørt, at kærarin ikki hevur individuellan og týðandi áhuga í málinum, og er tí ikki fevndur av skarðanum, ið hevur kærurætt eftir § 32, stk. 2, nr. 2, 1. pkt. í kappingarlógini, og kæran verður tí avvíst.**